

SENDISTOVAN

[Endurlýsing]

# Set tíni fingramerki á føroyska bygging

## Deildarleiðari til bygningadeildina á Landsverki

Vilt tú bjóða tær sjálvum av og seta varðar eftir teg við stórverkum og stásiligum bygningum, so letur Landsverk dyrnar upp fyri tær við einum spennandi og avbjóðandi starvi sum deildarleiðari á bygningadeildini.

**Høvuðsuppgávur**
Saman við dugnaligum starvsfeløgum verður tú við til at:
- greina og raðfesta nýbygging og viðlíkahald við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku.
- góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar, umframt viðgera onnur byggimál, har bygging, bygningar, lendi og formlist eru partur av viðgerðini.
- uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist.
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar.
- menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv**
Tú ert útbúgvin arkitektur, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella líknandi. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum í byggivinnuni er ein fyrimunur. Vit leggja dent á dygd og góðar loysnir, og vørumerki títt er tískil dugnasemi og nærlagni, har tú sum arbeiðsfúsur viðleikari gevur títt íkast til arbeiðsplássið og ta røttu byggingina.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars, 2008. Merk umsóknina „Deildarleiðari bygningadeildin" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á 540 801 ella ob@lv.fo.

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur.*
*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

# Sjúkrarøktarstjóri

**Starvið sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.**

Sjúkrarøktarstjórin er partur av sjúkrahúsleiðsluni saman við sjúkrahússtjóranum og læknastjóranum.

Næsti fyrisetti er sjúkrahússtjórin.

Ábyrgd og heimildir hjá sjúkrahúsleiðsluni:
- Sjúkrahúsleiðslan hevur í felag yvirskipaðu leiðsluna av Landssjúkrahúsinum. Í hesum liggur: visiónir, mál og menning, sjúklingaviðgerð, diagnostikkur og røkt, gransking, langtíðar fysisk og fíggjarlig planlegging, stovnsmenning og leiðslumenning.
- Sjúkrahúsleiðslan skal virka og uppfatast sum ein heild við sjúkrahússtjóranum sum tann, ið hevur endaligu ábyrgdina yvirfyri Almanna- og heilsumálaráðnum.

Serligt ábyrgdarøki hjá sjúkrarøktarstjóranum:
- Ábyrgd av yvirskipaðu samskipanini á røktarfakliga økinum.
- Veita ráðgeving í røktarfakligum spurningum til Almanna- og heilsumálaráðið.

Ábyrdarøki og arbeiðsuppgávur eru neyvari greinaðar í starvslýsing, sum er til taks.

Førleikakrøv:
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Sjúkrarøktarfaklig víðariútbúgving frá hægri lærustovni er ein fyrimunur
- Víðariútbúgving og royndir innan leiðslu og fyrisiting
- Kunnleiki og innlit í fíggjarstýring
- Holl vitan um sjúkrarøktina frá fleiri økjum
- Framskygni viðvíkjandi røktarfakligu menningini
- Kunna taka avgerðir saman við hinum báðum í leiðsluni
- Skapandi evni og óbundin av vanahugsan, duga og tora at raðfesta uppgávur
- Góð samstarvsevni
- Góð samskiftisevni
- Góð leiðsluevni

Lønar- og setanarviðurskifti
Starvið verður ármálssett í 5 ár og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, á stig 49, umframt ármálsviðbót, og ein ikki eftirlønargevandi viðbót, sum er kr. 5000 um mánaðin. Setanarøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí. Arbeiðsstað verður Landssjúkrahúsið. Setanarmyndugleiki er Almanna- og heilsumálaráðið. Talan er um fulltíðarstarv.

Nærri fæst at vita um starvið, starvslýsing v.m. við at venda sær til Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra, tel. 304500, lokal 1001 ella Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum tel. 304050.

Umsókn
Umsókn við avriti av prógvum, c.v., v.m. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Starvsfólkadeildin,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreist
Freistin at søkja er 7. apríl 2008, kl. 12.00.

KREA



ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo